# Yvirtøkulógin er tað reina bluff

**Formaðurin í Miðflokkinum kallar nýggju yvirtøkulógina fyri ein syrgiligan glæntrileik. Danski forsætisráðharrin hevur givið føroyingum eina skúmbanan, og so fær hann frið, men føroyingar vilja og tora einki**

YVIRTØKUR
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

– Hetta er stutt og greitt ein syrgiligur glæntrileikur.

Tað sigur løgtingsmaðurin Jenis av Rana, sum er alt enn nøgdur við nýggju yvirlýsingina hjá løgmanni og danska forsætisráðharranum um at gera eina yvirtøkulóg.

Hann samanlíknar yvirlýsingina við eina brochuru, kallar hana eina skúmbanan frá Fogh og heldur, at hetta er sum við nýggju klæðunum hjá keisaranum.

– Tað er tað reina bluff at billa fólki inn, at hetta skal føra okkum á sjálvstýrisleið. Hetta er í besta føri ein modernisera heimastýrislóg, og heimastýrislógin ella danir hava ongantíð verið nøkur forðing fyri, at føroyingar kunnu yvirtaka málsøki, sigur Jenis av Rana.



*– Yvirtøkulógin kann samanlíknast við ævintýrið um nýggju klæðini hjá keisaranum. Øll siga, at yvirtøkulógini er eitt stórt framstig, men eingin torir at siga, at keisarin er spillnakin, sigur ein bersøgin Jenis av Rana, sum kallar avtaluna við danir fyri eina skúmbanan frá Fogh*

### Sum ein hjún, ið ikki tora

Løgtingsmaðurin fyri Miðflokkin heldur, at yvirlýsingin ger hvørki til ella frá, tá tað ræður um størri sjálvstýri til føroyingar.

– Tú kanst samanbera hetta við eini hjún, sum ætla sær út at ferðast. Tey setast aftur, tí gamli Smyril er ikki nóg góður at sigla við. So kemur Norrøna, og tá eru umstøðurnar betri, men tey fara ikki alíkavæl. Og tá ið so nýggja Norrøna kemur, so er tað eitt fantastiskt framstig, og nú er lag á manni at fara avstað.

– Tey fáa sær altíð tær nýggjastu brochururnar og vísa tær fyri vinum og kenningum, men tey fara ikki avstað alíkavæl. Tey tora ikki, og tað kann gera tað sama, hvussu góðar brochururnar og skipini eru.

– Soleiðis er eisini við fullveldinum. Vit kunnu yvirtaka málsøki og taka loysing, um vit vilja. Men vit vilja ikki. Vit hava ikki torað, og vit tora framvegis ikki. Tí er tað nakað tvætl at siga, at yvirtøkulógini skal vera eitt so stórt framstig, sigur Jenis av Rana.

### Skúmbanan frá Fogh

Tað eru ikki hissini ákoyringar, sum yvirtøkulógin fær frá formanninum í Miðflokkinum. Hann heldur, at danski forsætisráðharrin hevur verið sera snildur.

– Hvør leiðari vil ikki hava frið í sínum ríki. Fogh er væl nøgdur, tí hann hevur givið føroyingum eina skúmbanan, og so er friður. Fogh er genialur, hann gevur føroyingum eitt skjal, og so veit hann, at hann fær frið, heldur Jenis av Rana.

– Hetta kann samanlíknast við ævintýrið um nýggju klæðini hjá keisaranum. Øll siga, at yvirtøkulógini er eitt stórt framstig, men eingin torir at siga, at keisarin er spillnakin.

– Eg haldi, at undirskrivingin yvirlýsingini skuldi verið gjørd tveir dagar fyrri, enn hon varð gjørd, tí so kundi hon verið gjørd í sambandi við føðingardagin hjá H. C. Andersen til at heiðra hann fyri ævintýrið um nýggju klæðini hjá keisaranum, sigur Jenis av Rana.

# Fullveldisløgmaður væl nøgdur

**– Tað er ikki longur avgerandi, hvat danir halda um eina yvirtøku. Nú eru tað føroyingar, sum taka avgerðina, og tað er gott, sigur Anfinn Kallsberg, fyrrverandi løgmaður fyri fullveldissamgonguna, um nýggju yvirtøkulógina**

YVIRTØKUR
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*



Nýggja avtalan við danir um eina yvirtøkulóg er eitt stórt framstig, og hon er millum annað eitt úrslit av fullveldissamráðingunum við danir, sum slitnaðu.

Tað heldur Anfinn Kallsberg, sum var leiðari fyri fullveldissamgonguna frá 1998 og seks ár fram.

– Hendan yvirtøkulógin líkist nógv tí, sum vit royndu at samráða okkum til við danir. Men tá slitnaðu samráðingarnar, tí danir vildu ikki viðurkenna føroyska sjálvsavgerðarrættin. Tað hava teir nú gjørt í hesi avtaluni, sigur hann.

– Tað er í grundini bara tveir munir millum hesa yvirtøkulógina og hana, sum vit arbeiddu við. Vit ætlaðu at yvirtaka nøkur málsøki samstundis, sum lógin varð samtykt, og okkara lóg skulu avgreiða leiklutin hjá fólkatinginum og løgtinginum, so tað var bara upp til landsstýrið at gera yvirtøkur, sigur Anfinn Kallsberg.

### Slagið skal standa í Føroyum

Men hóast munur er ætlanini hjá fullveldissamgonguni og nýggju yvirtøkulógini, so er Anfinn Kallsberg væl nøgdur við avtaluna við danir, sum Jóannes Eidesgaard, løgmaður, skrivaði undir mánadagin.

– Tað er ikki longur avgerandi, hvat danir halda um eina yvirtøku. Nú eru tað føroyingar, sum taka avgerðina, og tað er gott. Slagið um sjálvstýrið skal standa í Føroyum, sigur Anfinn Kallsberg.

Men klára tit at gera nakrar yvirtøkur í samgonguni, hóast nýggju yvirtøkulógina?

– Vit hava fingið nakrar yvirtøkur í samgonguskjalið, og tað er tað, sum vit hava kunna fingið semju um í hesum samstarvinum.

# – Tað er gott at fáa frið

**Formaðurin í Sjálvstýrisflokkinum er fegin um, at nú kann friður koma í tað áhaldandi stríðið millum danskar og føroyskar myndugleikar**

YVIRTØKUR
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Løgtingsmaðurin Kári P. Højgaard heldur, at yvirlýsingin hjá løgmanni og danska forsætisráðharranum um at gera eina nýggja yvirtøkulóg boðar frá góðum í sambandinum millum Føroyar og Danmark.

– Tað er gott, at vit umsíðir kunnu fáa frið í tí áhaldandi stríðnum millum føroyskar og danskar myndugleikar. Um lógin kemur at innihalda tað, sum tað verður lagt upp til í yvirlýsingini, so er hon eitt framstig fyri føroyingar, sigur Kári P. Højgaard, sum er einasti tinglimur fyri Sjálvstýrisflokkin.

### Taka stig frameftir

Hann heldur, at tað týdningarmesta í lógini er, at føroyingar verða viðurkendir av dønum sum eitt sjálvstøðugt fólk, og at føroyingar sjálvir kunnu gera av, um teir vilja fremja yvirtøkur.

– Tað er umráðandi, at vit taka stig frameftir og ikki binda okkum fastari í danska ríkið. Um endaliga yvirtøkulógin kann syrgja fyri tí, so er tað at fegnast um.

– Yvirtøkulógin kann lætta um mannagongdina, tá ið vit skulu taka yvir, og ósemjur við danir kunnu ikki forða fyri yvirtøkum. Nú vóni eg, at tær ítøkiligu yvirtøkurnar, sum verða fyrireikaðar, eisini kunnu gjøgnumførast í hesum valskeiðnum, sigur Kári P. Højgaard.

# Lættari at drepa grind

**Sandágerði:** Eitt sum mangan hevur verið til hindurs fyri grindadrápi í Havn eru teir tríggir steinarnir, ið liggja nakað úr landið á eystursíðuni av Sandagerðisvík.

Bæði grindaformenn og ikki minst grindamenn hava leingi ilskast inn á hesar steinar, og hava ynskt teir tiknar burtur. Og tað verða teir nú við tí arbeiðinum sum byrjar seinni í hesum mánaðinum.

Próvstagarðurin og eitt økið uttanum vórðu friðað í 1978, og tí varð málið fyrst lagt fyri friðingarmyndugleikarnar, sum nú hava viðgjørt málið. Náttúrufriðingarnevndin hevur avgjørt at loyva undantak eftir løgtingslógini um náttúrufriðing, og hesa avgerð hevur Yvirfriðingarnevndin staðfest.

Um miðjan apríl verður farið undir hetta arbeiðið, og tá hetta er liðugt, er ætlanin at pumpa meira av sandi inn í víkina.

Rættiliga stórar nøgdir av sandi vórðu miðskeiðis í áttatiárunum pumpaðar inn í Sandagerði, sum ikki bert gjørdist ein góð hvalvág, men eisini hitt mest vitjaða frítíðarstaðið í høvuðsstaðnum góðveðursdagar, bæði hjá børnum og vaksnum.

**sb.**